Dagf. 18. februar 2022
HMR j. nr. 22/02971-5

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður

Svar

upp á

fyrispurning nr. 52-122/2021 eftir §52a í tingskipanini um bíðilistar í Sjúkrahúsverkinum frá Jóannis Joensen, løgtingsmanni

Fyrispurningurin var soljóðandi:

1. Hvussu long er bíðitíðin til ymisku viðgerðirnar hjá sjúkrahúsverkinum?
2. Er bíðitíðin á psykiatriska deplinum longri enn ½ ár?
3. Hvør ítøkilig loysn er í umbúna fyri at minka um bíðilistarnar?

Til spurning 1
Sjúkrahúsverkið ger hundraðtals ymiskar kanningar, útgreiningar og viðgerðir og tað ber ikki til at geva eitt fullfíggjað yvirlit yvir, hvussu nógv fólk í løtuni bíða til allar hesar kanningar og viðgerðir.

Arbeiðið við at fáa álítandi bíðilistar og tíðir er umfatandi og samansett. Tað er eingin loyna, at hóast talgilda heilsuskipanin, sum Sjúkrahúsverkið brúkar, virkar sera væl á kliniska stignum, so er hon ikki sett eins væl upp í mun til at stýra yvirskipað við – millum annað tá tað kemur til hagtalsbrúk, bíðitíðir o.a.

Sjúkrahúsverkið er í gongd við at menna hendan partin og fór á sumri í 2020 undir javnan at almannakunngera bíðilistar og bíðitíðir á útvaldum serlæknaøkjum. Hesir síggjast á heimasíðuni hjá Landssjúkrahúsinum: ls.fo. Arbeitt verður við at fáa fleiri serøkir í yvirlitið.

Sjúkrahúsverkið hevur kannað hagtølini fyri søguligar bíðitíðir, sum fevna um bíðitíðir aftur í tíð. Altso, hvussu leingi bíðaðu sjúklingarnir eftir at fáa fótin innum gáttina til sjúkrahúsverkið eftir ávísing frá t.d. kommunulækna. Talan er ikki um akuttar støður. Sjúkrahúsverkið hevur nú tikið samanum tølini fyri 2021 sum vísa seg at verða umleið tey somu sum fyri 2020. Sí tølini fyri útvald serlæknaøkið fyri 2021 niðanfyri. Tølini eru ikki endaliga valideraði, og skulu tí takast við ávísum fyrivarni.

Koronasmittan hevur darvað virkseminum nakað í 2022. Tó væntar Sjúkrahúsverkið, orsaka av koronasmittuni at bíðilistarnir eru vaksnir nakað á summum økjum hetta tíðarskeiðið og harvið eisini bíðitíðin, eitt nú til ávísar skurðviðgerðir.

Skurðøkið
Um hugt verður eftir útvaldum økjum innan skurðøkið fyrst, so siga hagtølini, at miðalbíðitíðin til at koma til fyrstu viðtalu í parenkymkirurgi (t.d. tarmur livur, magi v.m) í 2021, hevur verið um 1-3 mánaðir í Sjúkrahúsverkinum, til endoskopi (kikarakanning) hevur bíðitíðin í miðal verið 1-2 mánaðir, til serlækna í kvinnusjúkum hevur bíðitíðin verið um ein mánað, og í urologi (m.a. landrás og nýrur), eru tað tríggjar mánaðir bíðitíð í miðal til serlækna. Ortopedkirurgi fevnir um nógv økir, eitt nú føtur, mjadnar, rygg, knø, akslar og ítróttarskaðar og eru staðfestu bíðitíðirnar eisini ymiskar. Somuleiðis er eisini ein ávísur munur ímillum sjúkrahúsini á summum økjum. Í miðal kanst tú vænta at bíða einar tríggjar mánaðir eftir at koma til forkanning ella 1. viðtalu í ortopedkirurgiini.

Medisinska økið
Sjúkrahúsverkið hevur eisini hugt eftir staðfestu bíðitíðunum í 2021 á útvaldum medisinskum serlæknaøkjum. Í onkologiini (krabbameinssjúkur) er bíðitíðin til 1. viðtalu í miðal 10 dagar, í gastroenterologiini (maga-tarm sjúkur) frá undir einum mánað til tríggjar mánaðir. Í neurologiini (nervalag) hava tey, ið hava verið til 1. viðtalu í ár, bíðað í 2-4 mánaðir – har bíðitíðin fyri umleið tveimum árum síðani var umleið 12 mánaðir. Til lungamedisin hevur bíðitíðin til fyrstu viðtalu verið ein góðan mánað og í reumatologiini (gikt) hevur bíðitíðin verið um fýra mánaðir til fyrstu viðtalu. Til svøvnambulatoriið er bíðitíðin ein mánað ella so, og bíðitíðin til pínuklinikkina er millum 3 og 6 mánaðir, alt eftir um talan er um fyrstu samrøðu við eitt heilsustarvsfólk ella tvørfakliga fyrstu samrøðu.

MR- og CT skanningar
Landsstýrismaðurin hevur eisini raðfest at fáa bíðitíðina til MR-skanningar niður á Landssjúkrahúsinum. Um farið verður til byrjanina av 2019 var bíðitíðin til at sleppa til eina MR-skanning umleið 6 vikur, ið varð mett at verða ov long tíð til eina tílíka kanning. Tað vórðu 250 tús. kr. játtaðar til hetta økið í 2020 og aftur 500 tús. kr. í 2021, soleiðis at MR skannarin hevur verið opin fýra kvøld um vikuna.

Tað er eydnast at fáa bíðitíðina burtur, soleiðis at tað í dag ongin bíðitíð er til MR-skanningar.

Tá ið tað kemur til CT-skanningar er tað soleiðis, at ávísingarnar verða visiteraðar dagliga og sjúklingar fáa upplýst tíð beinanvegin. Tað skal havast í huga, at ein CT-skanning kann krevja størri fyrireiking, tað við siga, at aðrar kanningar – til dømis onkrar blóðroyndir skulu fyriliggja fyrst og at tað tí tekur longri tíð, áðrenn skanningin kann verða framd. Kanningar, sum ikki hasta verða raðfestar og planlagdar 6 vikur fram. Samstundis er gjørt plass fyri tí, sum kann væntast at koma afturat, t.e. skanning av innløgdum, akuttum og sonevndum “sub-akuttum” sjúklingum.

Til spurning 2
Spyrjarin spyr um bíðitíðin á Psykiatriska Deplinum er longri enn hálvt ár. Sambært viðmerkingunum, hevur spyrjarin sjóneykuna á bíðitíðina til Barna- og ungdómspsykiatriina, sum skipanarliga nú liggur undir Familjudeplinum á Landssjúkrahúsinum. Stóra avbjóðingin er, at nógv børn afturat eru komin á bíðilista tey seinastu árini og tað hevur við sær, at tey, ið verða ávíst í dag, skulu vænta at bíða í upp til 18 mánaðir við verandi manning í Barna- og ungdómspsykiatriini. 217 børn vóru á bíðilista í barna- og ungdómspsykiatriini í januar 2022. Hyggja vit eftir teimum, sum vóru til fyrstu viðtalu í 2021, so bíðaðu tey í miðal 5-6 mánaðir, so talan er um ógvusligan vøkstur.

Bíðitíðin til útgreining fyri ADHD fyri vaksin er eisini long, umleið 15 mánaðir. Í hesum sambandi kann nevnast at bíðitíðin hevur verið omanfyri trý ár um vit fara umleið 3-4 ár aftur í tíð. Onnur økir í psykiatriini hava styttri bíðitíð. Til dømis er bíðitíðin til fyrstu viðtalu fyri fólk við demens tríggjar vikur, til fyrstu vitjan í økispsykiatriini er bíðitíðin tríggjar vikur, og til forsamrøðu við lækna í psykiatriini fyri vaksin, er bíðitíðin tveir mánaðir.

Til spurning 3
Frá fyrsta degi hevur Landsstýrið raðfest heilsuøkið høgt. Samgongan setti sær fyri, at í hesum skeiðnum skuldu játtast í minsta lagi 100 mió. kr. til heilsuøkið, umframt lønarhækkingar og prísøkingar. Nú skeiðið er meira enn hálvrunnið er komið væl áleiðis, og sett eru fleiri heilsustarvsfólk. Hetta fer at halda fram.

Leiðslan í Sjúkrahúsverkinum hevur sett fleiri átøk út í kortið, sum m.a. skulu hava við sær, at virksemið og tilfeingið í Sjúkrahúsverkinum kann gagnnýtast til fulnar.

Í hesum høpi kann nevnast ein felags visitatiónsskipan fyri Sjúkrahúsverkið. Við einari inngongd og felags visitasjón til ávísingar innan hvørja sergrein, kann sleppast undan dupultávísingum og harvið kann kapasiteturin gagnnýtast optimalt, og gjøgnumskygni verður í bíðitíðunum. Somuleiðis er skjøtul settur á arbeiðið, sum hevur til endamáls at tryggja, at allar skurðlinjur og ambulatoriikapasitetur í Sjúkrahúsverkinum verður gagnnýttur optimalt, so sjúklingurin ikki bíðar óneyðugt eftir kanning og viðgerð.

Í desember 2019 varð eitt álit handað landsstýrismanninum um viðgerðartrygd í sjúkrahúsverkinum. Í álitinum verður víst á fleiri átøk, ið eiga at verða gjørd fyri at stytta um bíðilistarnar og bíðitíðirnar. Arbeiðsbólkur við umboðum fyri tey 3 sjúkrahúsini og Heilsumálaráðið sita í løtuni og viðgera tilmælini og koma í næstum við ítøkiligum uppskotum til, hvussu tilmælini kunnu setast í verk, og hvussu tey kunnu raðfestast.

Psykiatriin er raðfest á fíggjarlógini fyri 2022. Tvær mió. kr. eru settar av til m.a. at styrkja um viðgerðartilboðini í Barna- og ungdómspsykiatriini. Í hesum sambandi hevur Sjúkrahúsverkið eftir áheitan frá landsstýrismanninum gjørt eitt uppskot til, hvussu bíðilistin og bíðitíðin í Barna- og ungdómspsykiatriini ítøkiliga kann styttast. Tað er víst á ymiskar loysnir at minka um bíðilistarnar í Barna- og ungdómspsykiatriini. Hetta verður viðgjørt í løtuni.

Eisini hevur Landssjúkrahúsið víst á, at serlæknamangul hevur verið í Barna- og ungdómspsykiatriini seinasta árið ella so og at tað hevur havt ávirkan á bíðitíðina. Landssjúkrahúsið arbeiðir í løtuni við at seta serlæknakonsulent, sum saman við øðrum átøkum, vónandi fer at bøta um bíðitíðina.

Heilsumálaráðið, 18. februar 2022

Kaj Leo Holm Johannesen
landsstýrismaður